INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

norden
NORÐURLANDAHÚSIÐ

Innlendismálaráðið bjóðar saman við Norðurlendska Ráðharraráðnum til kunnandi tiltak um fyrireikingarnar til eina nýggja altjóða veðurlagsavtalu. Norðurlond taka virknan lut í fyrireikingunum. Settur er ein norðurlendskur COP15-bólkur, hvørs endamál er at rudda slóð fyri einari framsóknari veðurlagsavtalu í Keypmannahavn við Danmark sum verti. Her heima er landsstýrið í holt við at fyrireika tiltøk at minka um útlátið av veðurlagsgassum so til ber hjá Føroyum at taka undir við nýggju Keypmannahavnavtaluni.

---

# INNBJÓÐING

## ALMENNUR FUNDUR

um eina nýggja altjóða veðurlagsavtalu í
Norðurlandahúsinum 19. mai kl. 13.00-16.00

### SKRÁ

| | |
|---|---|
| **13.00-13.30** | Annika Olsen, landsstýriskvinna setir fundin og umrøður føroysku fyrireikingarnar til eina nýggja veðurlagsavtalu. |
| **13.30-14.15** | Harald Dovland, norska umhvørvisráðið og næstformaður í arbeiðsbólkinum hjá ST um framtíðar skyldur at minka um útlátið av veðurlagsgassum, umrøður støðuna í altjóða veðurlagssamráðingunum fram móti Keypmannahavn. |
| **14.15-14.40** | Steðgur. |
| **14.40-15.05** | Lars Hasselager Olsen frá danska Energistyrelsen og Camilla Mørk frá danska veðurlags- og orkumálaráðnum umrøða samráðingargongdina í IMO um útlát av veðurlagsgassum frá skipum. |
| **15.05-15.25** | Kate Sanderson, Uttanríkisráðið, umrøður tilgongdina til altjóða veðurlagsfundin í Keypmannahavn. |
| **15.25-15.40** | Kaj Leo Johannesen, løgmaður endar fundin. |
| **15.40-16.00** | Hóvi er hjá fjølmiðlum at seta fyrilestrarhaldarum spurningar. |

*Tiltakið er ókeypis, men neyðugt er við tilmelding til kristvorp@imr.fo í seinasta lagi 18. mai á middegi.*




Tvey atgongumerkir til Mötley Crüe konsert í KB-Hallen 10. Juni eru til sølu fyri 495,- kr. pr stk.

ÁHUGAÐI RINGIÐ Á 220022

www.us.fo

# Starvsfólk til umhvørviskanningar

Søkt verður eftir starvsfólki til kanningarvirksemið at savna inn sýnir, at gera sýnisfyrireikingar, at skriva frágreiðingar og at luttaka í dátarapportering og kunningarvirksemi annars. Eisini umfatar arbeiðið fyrifallandi uppgávur, oftani tilknýtt verkætlanum.

**Arbeiðsøki**
Tú kemur at arbeiða á deildini, sum serliga arbeiðir við at kanna útbreiðslu og árin av umhvørviseitrandi evnum. Deildin mennir vitan um umhvørvið, serliga viðvíkjandi dálkingarevnum, og er við at mynda tað fakliga grundarlagið í umsitingarmálum.

**Førleikar**
Starvið er fjølbroytt og vit eru fleksibul í mun til útbúgvingarstøði, men síggja fyri okkum at tú ert MSc í evnafrøði ella lívfrøði. Umráðandi er, at tú er nærlagd/ur og at tú kanst átaka tær ymiskar uppgávur, eisini um tær onkuntíð eru rutinukendar, at tú eisini kanst arbeiða sjálvstøðugt er sjálvsagt. Koyrikort kemur væl við. Tað er ein fyrimunur um tú hevur góðan kunnleika til føroyskt mál og dugir danskt og enskt.

**Starvsmøguleikar**
Vit kunnu bjóða eitt spennandi starv í einum nýskipaðum stovni og við einum góðum arbeiðsumhvørvi.

**Setan**
Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Vit ynskja at setanin fer fram sum skjótast. Talan er um fyribilsstarv til 31. desember 2009, fulla tíð.

**Fyrispurningar**
Víst verður til okkara heimasíðu www.us.fo. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til:
Mariu Dam, deildarleiðara, ella
Jákup Paula Joensen, stjóra
á tlf 34 24 00

Umsókn saman við prógvum, CV o.l., skal verða Umhvørvisstovuni í hendi innan 01. juni 2009. Umsóknir skulu sendast til:

**Umhvørvisstovan**
Postboks 2048
FO-165 Argir

umhvørvisstovan

*Umhvørvisstovan er ein nýskipaður stovnur, sum fyrisitur lendismál, tinglýsing, fólkaskráir, náttúru- og umhvørvisvernd.*

sansir.fo




**Hesin fitti Opel Kadett B**

**er til til sølu. Er fyrstu ferð skrásettur í august 1973 og er í sera góðum standi. Hevur einans koyrt 54.000 km. Hevur havt tveir eigarar, tann fyrra fyrstu 28 árini. Til sølu fyri 22.000 kr**

**Ringið 216409**